**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Merking av toski og havtasku á Landgrunninum. Túrur nr. 1346**
**Tíðarskeið 12/9 - 17/9 - 2013**

---

**Fólk frá HAV:** Petur Steingrund, Mourits Mohr Joensen, Poul Vestergaard, Regin Kristiansen, og Jens Arni Thomassen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, kanningarleiðari.

**Endamál:** Endmálið er at kanna ferðingarmynstrið hjá toski og havtasku á føroyska landgrunninum.

**Reiðskapur:** Kassatrol 116 við 100 mm meskum í brókaposanum. Steinham lemmar. Breitlalongin er 60 m. Rockhopper grunnur. Til merkingina: merkipistól og merkir, mátibretti, vekt, kassar og slangur, skriviútgerð og teldur.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hóskvøldið 12/9-2013 kl. 21.15. Vegna vind av útsynningi fóru vit fyrst eystur um Nólsoy og merktu tosk haðani móti Svínoy. Fríggjadagin fóru vit vestur á Mýlingsgrunnin, har vit merktu 167 toskar. Vegna vind av vestri máttu vit taka okkum eystureftir og merktu nakrar toskar norður úr Viðoy. Løgdu okkum at kroka eystan fyri Viðoy leygardagin. Sunnudagin merktur vit aftur tosk eystan fyri Svínoy og suður móti Nólsoy. Vit vóru á Havnini týsdagin kl. 15. Merkingarlistin er vístur í talvuni niðanfyri.

**Fyribilsúrslit:** Væl gekst til tíðir at fáa merkt suður-eystur úr Svínoy, meðan tað gekk meira striltið í hinum støðunum. Toskurin var størstur eystanfyri (63,3 cm í miðal), og var eisini óvanliga væl fyri (høgur konditiónsfaktorur = 1,12, sí talvuna). Vit fingu fýra merktar toskar aftur, sum allir høvdu verið úti í minst eitt ár.

| Øki | Havtaska | Toskur | Miðallongd | Miðal K |
|---|---|---|---|---|
| Á Mýlingsgrunni | 1 | 167 | 61.1 | 1.03 |
| Norður úr Viðoy | 0 | 38 | 56.3 | 1.08 |
| Eystanfyri | 4 | 990 | 58.5 | 1.12 |
| Íalt | 5 | 1195 | 58.8 | 1.11 |

**Nær eru merkilistarnir lisnir inn á teldu:**
Merkilistin var liðugur, tá túrurin endaði.

Á Havstovuni 19. september 2013
Petur Steingrund – kanningarleiðari.